## Inter dregur frá hinum

Inter spældi í gjár dyst í italsku Seriu A. Dysturin var ímóti Empoli, og Inter vann 3-0. Málskjúttar vóru Hernan Crespo, Zlatan Ibrahimovic og Walter Samuel. Við sigrinum dregur Inter frá hinum liðunum í deildini, og Inter er nú sjey stig frammanfyri næstbesta liðið, sum er Roma. AC Milan hevur trupulleikar, og um vikuskiftið spældu teir málleysan javnleik á heimavølli ímóti Torino. 11 minuttir fyri tíð brendi Milan brotsspark.

## Javnleik uttan Claus

Claus Bech Jørgensen spældi ikki við, tá Blackpool leygardagin spældi javnleik í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Blackpool spældi á heimavølli ímóti Swansea, og liðini fingu eitt mál í part. Tað vóru tó spælarar hjá Blackpool, sum skoraðu bæði málini. Í fyrra hálvleiki gjørdi Dickinson sjálvmál, men sjey minuttir fyri tíð javnaði Vernon fyri Blackpool, sum liggur nummar 11 av 24 liðum í deildini. Blackpool hevur fingið 29 stig fyri 21 dystir higartil.



Kyndil-StÍF 22-23 (8-8):

# Vánaligt men spennandi

**Tað var ikki tað stóra hondbóltsspælið, sum eyðkendi dystin á Hálsi sunnudagin. Men spenningurin helt sær til tað seinasta, tá Jakob Jónsson sendi seinasta bóltin í Kyndils-meskarnar**



*Talan var fyri tað nógva um sera rótut spæl, tá Kyndil og StÍF dystaðust sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í nógvum, nógvum førum hava Kyndil og StÍF givið føroyska hondbóltsáskoðarunum nakrar av bestu hondbóltsuppilvingunum, sum finnast her í Føroyum. Við støði í ferðmiklum tekniskum spæli hevur talan tíðum verið um sannar góðbitar fyri hondbóltsáskoðaran, og tí mundu nógv fara spent niðan á Nabb sunnudagin. Ikki minst heimaáskoðararnir, sum eftir tveir Kyndilssigrar á rað so smátt vóru farin at trúgva upp á lið sítt aftur.

### Nógvar villur

Men talan varð nú ikki um ta stóru hondbóltsupplivingina. Ein fyrri hálvleikur við bara 16 málum kundi kanska bent á gott verjuspæl, men tað var nú heldur ikki tað, sum var atvoldin til hetta.

Skal nakað positivit finnast hendan hálvleikin, so var tað góða málmansspælið, sum Lars Black og Marian Cirloganescu sýndu. Í aðrar mátar var talan um eitt hav av tekniskum feilum, illa umhugsaðar skotroyndir og eini sera lágari leikferð.

Serstakliga gekst illa hjá gestunum fyrstu løtuna, og tyrstu 17 minuttirnar fingu teir bara tvey mál. Lukkutíð fyri teir hevði Kyndil tað ikki so øgiliga nógv betri, og tí fekk StÍF bart seg upp á javnt við seks málum seinastu 12 minuttirnar.

### Bíðaði til evstu løtu

Málini gjørdust nakað fleiri eftir steðgin, men tað var framvegis trupult at finna nakað serligt hondbóltsspæl. Liðini bæði fylgdust væl uppeftir, men um miðjan hálvleikin tók dysturin eina avgerandi vend.

Innan fyri eini 20 sekund fekk Kyndil tvær útvísingar, og so vaknaðu StÍF og ikki minst Bárður Danielsen. Væl stríðandi vongurin fekk sær fýra kassar á rað, tá StÍF væl megnaði at spæla undirmannaðu mótstøðuverjuna tunna, og so tóktist alt avgjørt. Ikki minst, tá StÍF sutt eftir aftur økti, soleiðis at støðan fimm minuttir undan dystarloki var 22-17 í teirra favør.

Kanska hildu strandingar nú eisini sjálvir, at sigurin var heima. Í øllum førum fekk Kyndil tríggjar ferðir á rað revsað sløsut spæl frá gestunum, og so varð brádliga spennandi.

Tá Kyndil so fekk møguleikan at javna, tóktist eingin vilja standa við avgerðini. Marian hevði tá longu tikið fýra av fimm brotskøstum, og tá eingin annar helt sær til, trein Hans Áki fram fyri Kyndil. Tað eydnaðist at javna, men í næsta álopinum fekk StÍF kortini svarað aftur. Hetta tá Jakob sendi inn um nærmara stólpa. Kyndil royndi at svara í seinasta álopinum, men sekundini vóru ov fá, og so kundu gestirnir enn eina ferð fegnast um sigurin.

### Ov nógv á fáum

Tað hevur verið sagt fleiri ferðir um StÍF, at ov nógvar byrður liggja á herðunum hjá Finni Hanssyni, og dysturin hesa ferð var ikki nakað undantak í so máta.

Finnur hevði kanska ikki sín besta dyst, og tó at hann fekk sjey mál, so vórðu hampuliga nógvar skotroyndir nýttar til hesi.

Men tað er merkisvert, at løtan, har Kyndil mundi tikið StÍF aftur, var, tá teir fóru út at mansverja Finn. Hóast strandingar nú høvdu bæði Jakob og Leiv við aftur í bakk-ketuni, so tóktist hetta steðga spælinum fullkomuliga. Og tað er ein støða, sum StÍF ivaleyst noyðist at arbeiða við til komandi dystirnar.

Hjá Kyndli er hinvegin framvegis nógv arbeiði. Enn er Høgni Klein ikki í dystarvenjing, og tað er kanska fyrsta fortreytin fyri, at spælið skal hanga saman. Men fyri tað eigur tað framvegis at kunna roknast við meira enn tí, sum fleiri av hinum spælarunum sýndu sunnudagin.

## FAKTA

**Kyndil-StÍF 22-23 (8-8)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 6(2), Rókur Akralíð 6, Hanus Johansen 5, Hjalti M. Jacobsen 2, Hans Arni Thomsen 1, Høgni Klein 1, Ken Zachariassen 1
**StíF:** Finnur Hansson 7(1), Leivur Justinussen 4, Jakob Jónsson 4, Bárður Danielsen 4, Andre F. Danielsen 2, Bent Djurhuus 1, Terji Poulsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6. StÍF 1
**Útvísingar:** Kyndil 4, StÍF 6
**Dómarar:** Uni Wardum & Hannis Wardum

## Gjørdist heldur spennandi

Hóast Bent Djurhuus var væl nøgdur um, at hann og StÍF høvdu fingið tvey stig við sær norður úr Havnini, so ásannaði hann, at avrikið fyri tað nógva ikki var meira enn næstbesta.

- Eg haldi nú ikki, at hatta var nakar góður dystur, og sum so hevði eg roknað við, at Kyndil var betri fyri, nú teir hava vunnið tvær ferðir á rað. Serliga í fyrra hálvleiki spæla vit beinleiðis illa, men hóast hetta er munurin ongan tíð størri enn trý mál. Og tað sigur væl nakað um, at teirra spæl heldur ikki gekk eftir vild.

Tit koma tó fyri tykkum, og hava eitt skifti trygga leiðslu. Hvat hendir, tá tit missa hesa?

- Tað vísir seg, sum skal tað gerast spennandi hjá okkum. Í veruleikanum er dysturin jú lukkaður, tá vit gagnnýta, at teir eru tveir í undirtali, og tað fær okkum kanska at slappa av. Í øllum førum fáa teir tvey skjót kontra, og so eru teir brádliga við, men tíbetur megnaði Jakob so at senda handan seinasta bóltin inn. Tað gav okkum stigini, og tað var tað týdningarmesta í dag.

- Stigini gera so, at vit hanga í VÍF í oddinum, og longu um tvær vikur skulu vit aftur spæla móti Kyndli. Ta ferðina í steypakappingini. So mugu vit hyggja, um tað eru nøkur mistøk, sum vit kunnu rætta nakað upp til tann dystin, sigur Bent flennandi.